## VIÐMERKINGAR

# Skal Oyrareingir-Signabøur oyðast sum trivnaðarbúpláss?

**Thomas Arabo**



Á Oyrareingjum-Signabø búgva í dag tvey til hálvtriðhundrað fólk. Her er gott og slætt lendi fram við fjørðinum líka úr dalinum út á Sperm (gomlu hvalastøðina). Um økið verður lagt út til sethúsabygging so má roknast við at eini 6-700 fólk búgva her um nøkur fá ár. Økið er eitt tað mest barnavinarliga í landinum-her er stutt bæði til fjals og fjøru og eingin gjøgnumgangandi ferðsla.

Síðst í 80-unum var tað "in"at hvør kommuna skuldi hava ídnaðarøkir so virkir kundu verða bygd saman, so tey ikki vóru til ampa ímillum hús í bústaðarøkjum. Kollafjarðar Kommuna tók so avgerð um at leggja eitt slíkt øki framm við landi inni á Oyrareingjum. Í 1988 bleiv so byrjað og sprongt bleiv út niðan ímóti vegnum og grótið koyrt á sjógv. Eitt sindur harmuligt at síggja tað vøkru fjøruna verða sprongda burtur men úrslitið var so byrjanin til eitt hampuliga stórt øki íð fór nakrar metrar - kanska 20 út frá landi. So kom kreppan og arbeiðið steðgaði tí pengar vóru ikki til at halda fram. Økið lá so og samlaði órudd í eini10-12 ár. Burtursæð frá at økið sum so sá út sum "Jerusalems ødlæggelse", so sá tað ikki út til við tí lítlu frástøðu sum tað hevði frá landi at tað nervaði tí vøkru og sermerktu náttúru og tað fuglalív sum var á Oyruni nakað nevnuvert. Daláin sum jú er grundarlagið fyri teimum náttúrufyribrigdum sum har eru, rann so at siga ótarnað.

Í 2000 eru vit so komin í Havnar Kommunu og nú hendir so nakað á økinum. Stórur partur av grótinum frá Vágatunnlinum verður koyrt á sjógv her á Oyrareingjum og menn byrja at tosa um at gera havn her so at siga uppi á turrum.

Tað sum er hent inni á økinum á Oyrareingjum síðan grótið frá Vágatunnlinum kom afturat er at økið er líka órudduligt -lat tað fara - men tað sum er ógvuliga nógv meira órógvandi er at Daláin nú er so mikið innibyrgd at alt blívur ein sugga innan fyri hesa ólukku útfylling helst til stóran ampa fyri alt lív og umhvørvi har inni. Harafturat so fyllist alt so skjótt við sandi nú so trongt er blivið at um 20 ár er heilt sikkurt turt lendi har sum keiin á Langasandi er í dag.

**Nýggj byrjan - trivnaður, umhvørvið og barnafamiljur raðfestast høgt.**
Soleiðis segði nýggi býráðsmeirlutin tá hann tók við.Her hjá okkum er tað hent,at okkurt øki afturat er lagt út til sethúsabygg ing.Umhvørvisnevndin hevur lýst ruddingardag í allari kommununi men tykist ikki at hava áhuga í tí neyðtøku av umhvørvinum sum fer fram her hjá okkum, ella kanska tey ikki hava varnast. Nú havi eg so gjørt vart við tað!

Og so koma vit til ætlanirnar um at byggja havn her inni. Kontainarhavn - tað ljóðar so flott og onkur tosar um nógv arbeiðspláss. Við mínum kunnleika til slíkar havnir og eg havi kannað nógvar so eru næstan eingi arbeiðspláss - har er alt so automatiserað, at tað er næstan fólkatómt.

Alt í alt so er hettar eitt krypulprojekt alt sum tað er. Oyðileggjandi fyri plássið, forðandi fyri menning sum trivnaðar búpláss og leggur upp til klandur og rok í eina langa framtíð, til fedranir at hesum projekti síggja, at her fóru teir skeivir.

Dugi ikki við mínum besta vilja at síggja, at teir myndugleikar sum hava ábyrgd av at okkara náttúra skal umfarast skynsamliga, ikki gera vart við seg. Og býráðsmeirlutin, íð telur teir flokkar sum hava hægsta etiska støðið, kunnu ikki hava viðgjørt hettar málið og góðkent hesa ætlan, tí so er trúvirðið fokið

**Hvat er skilagott at gera?**
Fyri 30 árum síðan var skilamaðurin Øssur av Steinum inni á gólvinum - hugsi hann var borgarstjóri tá - og tosaði um at gera havn úti á Sperm og út eftir, tí sum hann málbar seg "tað at havnarmenn trunka oljutangar, skipasmiðju og fiskavirkir saman á Vestaru vág tað kemur einaferð at forbjóða seg sjálvt". Tann dagurin sær út til at nærkast skjótt.

Ongantíð blivu ráðini til at byggja umrøddu havn. Ikki tí at økið er gott - óavmarkaðir møguleikar at víðka økið suðureftir tað verið seg bæði til containarahavn, oljuvinnu og líknandi. Har verður ongantíð bústaðarøki - har er for bratt. Síðan eigur vegur at verða gjørdur frá tunnilsmunnanum oman fyri núverandi búsetingina og út á Sperm. Stikvegir kunnu so bindast í verandi veganet til og ímillum húsini, íð eru og koma. Ein slík loysn hevði verið langsiktað og góð. Í veruleikanum er tað einki her sum hastar so øgiligt - um Norrøna leggur at í Runavík einar tvær tríggjar ferðir um árið ja tað eigur ikki at fáa skilafólk í Tórshavnar kommunu at grýta fleiri tíggjutals milliónir burtur í óðum verkum.

Tað fyrsta sum má gerast er tó at hampa um økið inni á Oyrareingjum og gera tað nýtsluklárt til okkurt skilagott. Kundi verið til smærri virkir, ella hví ikki flutt alt virksemið í samband við aling her yvir tí har herast krøvini til at slík virkir skulu haldast burtur frá øðrum virksemi. Tað at gera økið borðbært aftur kann blíva eitt størri arbeiði, tí eg kundi ímyndað mær at friðingarmyndugleikarnir kundu sett krøv um at innaru hornini á báðum útfyllingunum - bæði tí norðaru og tí sunnaru - blivu tikin upp aftur, so sjógvur fær frítt at fara inn í hasa sugguna, sum nu er komin.

**Áheitan.**
Tit í býráðnum lovaðu okkum eina nýggja byrjan og nýhugsan. Tað líta vit so á, og rokna við at vit sum borgarar í Tórshavnar Kommunu verða líka virðismettir við aðrar borgarar sum búgva nærri Vaglinum. Eitt sum ongantíð má gloymast er at Kollafjørður ongantíð verður ein býlingur men ein bygd við øllum teimun eyðkennum ein bygd nú einaferð hevur.

Øll hava vit skyldu at taka atlit til náttúruna og trivnað hjá fólki íð býr við fjørðin. Taðverður ikki gjørt við at kroysta eina kontainarhavn inn á botn í Kollafirði við øllum teimun negativu avleiðingum, íð fylgja við einari slíkari.

---

# Skal framtíðin hjá Suðuroy byggjast á "Revolvarapolitikk" frá løgmanni, Hendrik Old og Johan Dahl?

**Tom Silvurdal**



Tórskvøldið, júst komin til landið, bórust tey tíðindi í útvarpinum, at landsstýrið hevði tikið avgerð um at flyta Miðnámsskúlan úr Vági til Hovs! Annars ikki eitt kvekk um hvussu, hví og hvat hetta vildi viðføra fyri framtíðina hjá okkara oyggj.

Tað skal ikki verða nøkur loyna, at mín skriving um framtíðina hjá Suðuroy ikki hevur verið grundað á nakra "heilaga kúgv", sum t.d. hvar Miðnámsskúlin skal byggjast.

Mín skriving hevur lagt upp til at karmarnir fyri okra framtíð her í Suðuroy, skuldu skapast av okra fólkavaldu ígjøgnum samráðingar. Framtíðin og grundarlagið fyri framtíðini hjá Suðuroy er ein heildarloysn.

Eitthvørt mál sum í dag skal viðgerast hevur eina saksmappu. Saksmappan fyri "Endurreisn av Suðuroy", er ein sera tunn mappa, sum byrjaði hin dagin í sept. 2004, tá Føroya Landsstýri (F.L.) var á vitjan hjá Vágs Býráð.

Øll tann skriving og alt tað kjak sum hevur verið í Føroyum um okra oyggj,er eftir mínari meting bert innleiðingin til hesa komandi sera tjúkku saksmappu – "Endurreisn av Suðuroy".

Tað var mín vón, at øll mín skriving um okra oyggj fór at føra til konstruktivar og positivar samráðingar millum okra kommunalpolitikarar og F.L. – herundir serliga løgmann.

Men veruleikin er jú tann, at hóast onkur ráðstevna og onkur politisk 10 punktsætlan er framløgd fyri Suðuroy, so hava ongar veruligar politiskar samráðingar verið millum kommunurnar og F.L.

Tí kann ein, grunda á sítt vit og skil, spyrja hvussu kann F.L. anno 2005 taka eina avgerð um at flyta Miðnámsskúlan.

Føroyar hevur í dag eina stóra vælútbúna umsiting. Er tað ikki uppgávan hjá umsitingini at syrgja fyri, at skriva og útvega skjalatilfar til saksmappuna "Endurreisn av Suðuroy".

Er tað ikki, anno 2005, komið hartil, at føroyskir politikarar taka avger í einum so stórum máli sum hesum, grundað á tað skjalatilfar sum fyriliggur í saksmappuni fyri Suðuroy?

Ein kann mann rópa til himmals og óiva onki svar fáa - hvørki frá politikarum ella aðalstjórum, deildarleiðarum, búðskaparfrøðingum o.s.fr.

Hvar er saksmappan fyri "Endurreisn av Suðuroy". Hvørji skjøl fyriliggja í hesu mappu, sum kann prógva, at Miðnámsskúlin ikki skal vera í Vági, Sumba, Porkeri, Øravík, Tvøroyri, Fámjin, Hvalba, Sandvík ella Víkarbyrgi.

Um F.L. og tess umsiting hevur nøkur loynilig skjøl í saksmappuni, sum kunnu prógva, at burturúr einari heildarætlan fyru Suðuroy, so er best at skúlin verður í Hovi – kunnu tit ikki almannakunngera hesi beinan vegin!

Komin til Suðuroy royndi man beinan vegin at fáa kanna hvussu hendan avgerðin hjá F.L. var komin í hús.

Seinast man visti, hevði Tvøroyrar Býráð alment melda út, at teir virdu avgerðina hjá Vágs Býráð, og tí ikki vildi viðmæla at flyta Miðnámsskúlan úr Vági. Sostatt høvdu tvey býráð, sum umboða yvir 70% av Suðuroy, eina felags støðu í hesum málið.

F.L. og umsiting tess hava síðan fundin í sept. 2004 í Vági, sitið og sovið í Tinganesi. Tí kom henda útmelding frá Tvøroyrar Býráð, hetta fyri at fáa lagt lok á málið, soleiðis at tað dagliga kommunala arbeiði sum F.L. órógvaði, kundi byrja aftur.

Men F.L. hevði eitt annað vápn í beltinum sum gjørdi at saksmappan um "Endurreisn av Suðuroy" kundi verða skrall tóm. F.L. og umsiting tess snorksova í dagar og mánaðir – og alíkavæl, uppá minni enn 7 dagar – taka eina avger ímóti 70% av teimum fólkavaldu í Suðuroy.

Fyri 7 døgum síðan vóru 4 javnaðarumboð frá Tvøroyrar Býráð hjá løgmanni í Tinganesi, og tosaðu um Miðnámsskúla og ellisheim í Suðuroy. Avgerð bleiv tikin á hesum fundi, og sum skilst, bleiv givið hond uppá at løgmaður virdi avgerðina hjá Tvøroyrar Býráð og Vágs Býráð sum vildi víðført skúla í Vági og ellisheim á Tvøroyri.

Men mitt í farnu viku kom speril í. Løgmaður leyp frá avtaluni og fór síðan at ávirka javnaðarumboðini í Tvøroyrar Býráð, samstundis sum løgtingsumboð sambandsfloksins í Suðuroy eisini fór undir at ávirka sambandsumboðini í Tvøroyrar Býráð.Líkt er til at hettar arbeiði hevur eydnast.

Hetta var grundarlagið fyri tíðindaskrivinum úr Tinganesi tórsdagin í síðstu viku. So stórur er seriøsiteturin hjá okra fólkavaldu anno 2005. Ein so stór avger um Miðnámsskúlan í Suðuroy verður tikin uttan saksmappu ella saksviðgerð, men við persónligari telefonuppringing frá harra løgmanni til tann einstaka einsamalla kommunupolitikaran (partísoldatin).

Soleiðis virkar okra Socialdemokrati anno 2005. Hvar er virðingin fyri tí einstaka borgaranum. Neyvan man seinasta orið vera sagt í hesum málið.

Framtíðin hjá Suðuroy skal ikki skipast av "Revolvarapolitikki Løgmans". Slíkur politikkur hoyrir ongastaðir heima í 2005. Avgerin skal takast á skjalprógvaðum grundarlag, hvar tað klárt framgongur hvør er besta avgerðin fyri Suðuroy í hesum málið.

Vónandi fer Føroya Løgting at átala framferðarháttin hjá løgmanni í hesum málið.

Avgerðir tiknar fyri Suðuroy á slíkum grundarlag fara suðringar ikki at góðtaka. Vónandi skilja okra fólkavaldu kommunustýrisumboð boðskapin í hesi grein. Eitt minimum av seriøsiteti, tá politiskar avgerðir vera tiknar – hvat hevur F.L. annars embætisfólk til?